# Spennandi upplivingar í Reykjavík



## Reykjavík er komin í lag við 25 av mest áhugaverdu ferðamálunum í Europa.

Tað er Tripadvisor, ið er ein av týdningarmestu ferðavinnu-síðunum í heiminum sum hevur avgjørt hetta.

Fólk í íslendsku ferðavinnunu eru rættiliga errin av hesum heiðrinum, sum setur høvuðsstað teirra á sama stað sum París, Pragh,Venedig, Barcelona og aðrar vakrar býir kring alt Europa.

Hjá Tripadvisor verður tikið soleiðis til:

Reykjavík hevur heiðurin sum heimsins norðasti høvuðsstaður, og fyri nógv av ferðafólkunum er býurin eisini at meta sum inngongdin til eitt hav av spennandi upplivingum.

Her hevur tú haraftrat møguleika at endurløða teg eftir spennandi ævintýr í náttúruni í teimum heitu keldunum ella innandura spa-baðum.

Vit hámeta eisini stórsinnið hjá íslendingum og teirra orkufullu mentan, ið fevnir um altjóða viðurkendan tónleik og ein forvitnisligan listapall, ótrúligan mat og eitt spennandi náttarlív.

### HÁMETTUR

*Íslendski høvuðsstaðurin er undir liðini á teimum stóru býunum í Europa, tá talan er um upplivingar og mentanarlig tiltøk*


